# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gott fyri likam og sál

Í dag, týsdagin 18. desember, eru 25 ár liðin, síðani Svimjihøllin í Gundadali varð tikin í nýtslu. Dagurin verður eitt nú hildin við, at tað verður ókeypis at svimja í dag. Almenn svimjing er frá klokkan 6.45 og til klokkan 9.00 og aftur frá klokkan 15 og til klokkan 20. Móttøka var í høllini fyrrapartin. Svimjihøllin varð fyri fjórðingsøld síðani bygd á økið, har hondbóltsvøllurin í Gundadali hevði verið frammanundan. Umleið hálvt annað hundrað túsund vitja høllina á hvørjum ári.

Føroyingar eru siglandi fólk og sera tætt knýttir at teimum vátu elementunum. Okkara forfedrar løgdu tí sera stóran dent á at læra børn at svimja. Svimjing var ein tann fremsta ítrótt hjá okkara forfedrum og løgdu teir í uppalingini eins nógv í, at tann ungi skuldi duga hesa ítrótt eins væl og vápnaleik. Svimjing gjørdist í trýatiárunum lærugrein í skúlunum og serstakur lærugreinaráðgevi varð settur at menna hesa ítróttagrein í fólkaskúlanum. Kommurnur um alt landið lótu byggja svimjhyljar og børnini lærdu at svimja, hóast vatnið var kalt og umstøðurnar sera primitivar.Sum tíðirnar batnaðu og tilvitið hjá myndugleikum og einstaklingum um týdningin av svimjing øktist, fóru land og kommunur undir miðvísa útbygging av teimum hentleikum, ið hoyra hesi ítróttagrein til. Vestmanna kommuna gekk á odda við Føroya fyrsta innandura svimihyli, síðan fylgdu aðrar kommunur eftir og í dag eru at kalla allir hentleikar á hesum øki.

Svimjing er ein ítróttar- og lærugrein, sum ikki bert er góð, uppbyggjandi og mennandi fyri likam og sál – hon bjargar eisini mannalívum og mangur sjómaður hevur sannað, at tað var gott at hann hevði lært at svimja, áðrenn hann kom til mans. Tað eru tí allar góðar grundir til at ynskja Svimjihøllini í Gundadali og havnarfólki tillukku við degnum. Tað eru eisini allar góðar grundir til at fegnast um ta sera sterku støðu sum svimjing sum ítróttargrein hevur í Føroyum. Ungir føroyskir svimjarar gera seg sterkt galdandi úti sum heima og Føroyar eru millum fremstu svimjitjóðir. Ein orsøkin til hesa sterku støðu er, at vit hava hentleikarnar – ein onnur orsøk er sjálvsagt at finna hjá teimum ungu sjálvum, teirra venjarum og teirra miðvísu stremban eftir at vera millum tey fremstu í heiminum. Vit mugu í dag so heldur ikki gloyma týdningin svimjihallirnar hava fyri tilkomin og eldri eisini sum motion og avstressing. Tær ganga á odda fyri at varðveita eina sunna sál og í einum sunnum likami.

**Sosialurin**

## Tá tit/vit lata okkum lumpa

**JÓGVAN E. ÓSÁ**

josa@post.olivant.fo



Tað er tó fantastiskt. Ja, eg má so siga. Tað er tó fantastiskt, so væl øll lata seg lumpa av politikarinum í Havn og miðøkinum.

Eg hugsi um uppstillingina.

Fyri at koma á løgting komandi val, skal tú hava minst 300 atkvøður – kanska 400. Hetta hava Edmund Joensen og Co. syrgt fyri, nú vit hava eitt valdømi.

Satt at siga, trúði eg, at tað fóra at ganga eitt/tvey/trý val, áðrenn vit fóru at síggja virkningin av einum valdømi, men tað sær út til, at vit fáa virkningin longu nú.

Ja, hvat gera valfeløgini kring oyggjarnar?

Jú, tey stilla fleiri valevni upp. Við tí úrsliti, at tey "stjala" frá hvørjum øðrum, soleiðis, at miðstaðarvalevni – gogar, lærarar, journalistar, serfrøðingar, tey ið eru kend, verða vald (sitat Hendrik Old, skilamannin úr Suðuroy, ið nú ikki stillar upp aftur). Og ongin "vanligur" føroyingur kemur inn á ting.

Javnaðarflokkurin ger eina roynd í Sandoy, og tá ið Tjóðveldisflokkurin roynir at gera somu roynd í oynni, ja, so er rok. Við tí úrsliti, at ongin tjóðveldismaður kemur inn í Sandoy.

Hóast eg ikki eri tjóðveldismaður, verður saknur í Páll á Reynatúgvu, tí hann er og hevur verið ein av teim fáu í løgtinginum, ið hevur "høvd".

Í Vágum royna tey at fáa Marius Dam inn aftur við ikki at stilla Rósu Samuelsen upp aftur. Men hvat ger leiðslan í flokkinum, Havnin, jú hon stillar hana upp. Hetta ger, at tey "stjala" frá hvørjum øðrum, og hvørgin kemur inn.

Í Norðoyum stillar mín flokkur, fólkaflokkurin, Elsebeth Hansen upp, ið bara kann "stjala" frá Jákup Mikkelsen, við tí úrsliti, at bert Annfinn Kallsberg kemur inn fyri Fólkaflokkin í Norðoyum.

Og hetta við at umskylda seg við, at konufólk skulu á listan?? Renn meg eitt vist stað.

Onkur hevur sagt, at føroyingar eru býttasta fólkaslag, ið til er á jørðini.

Vita tit hvat??

Tað passar.

## Nei, nei, ikki blokkin í eitt ár, men heldur blokkniðurskurðin í tvey ár

**ANN HOVLAND**

sjúkrasystir

Í blaðgrein heldur Joel undir Leitinum (JuL) fyri, at blokkurin í eitt ár (uml. 600 mió. kr.) kann fíggja Sandoyartunnilin og nevnir allar herligheitirnar, blokkurin kann brúkast til um vit bert fáa loyst frá Danmark.

Blokkurin fíggjar sum er okkara heilsuverk, sjúkraviðgerð uttanlanda, pensiónir, serforsorg og stuðul til sjúkrakassar og ellis- og røktarheim, fyri at nevna nøkur av málsøkjunum. Hvat heldur JuL skal henda við hesum málsøkjum, tað árið peningurin verður brúktur til Sandoyartunnilin? Hvussu hugsa loysingarfólk?

Skulu sjúkrahúsini lata aftur og sjúkraviðgerð uttanlanda bíðja eitt ár? Hvørjum skullu pensionistarnir liva av hetta árið? Og tey sum fáa serforsorg? Og skulu sjúkrakassarnir smekka lokið í og annað hvørt ellisheim lata aftur?

Nei, so heldur brúka blokkniðurskurðin í tvey ár (uml. 700 mió. kr.) at fíggja Sandoyartunnilin við!

Í farandi samgongu noktaði Fólkaflokkurin saman við Javnaðarflokkinum enntá Sambandsflokkinum at samráðast við danir um at endurskoða fastfrystingina av blokkniðurskurðinum. Her kann JuL gera mun.

## Til Landsverk

**MAGNI FLES**

Sunnumorgunin tann 9.12.07 kl. ca. 03.00 fór undirritaði frá Klaksvík til Havnar. Koyrilíkindini vóru ikki av teimum bestu, tað var vátaslettingur. Beint áðrenn eg komi til Funningsfjarðarvegin síggi eg eitt stórt skelti har, tað stendur at arbeitt verður í tunnlinum, eg geri so av at fara um Eiðisskarð, komin um Eiðisskarð gjørdi eg av, at eg ikki skuldi fara um Eiðisskarð á veg norðuraftur, tí koyrilíkindini vóru so vánalig.

Ávegis norðuraftur og komin niðan móti rundkoyringini oman fyri Norðskála síggi eg eitt stórt skelti, sum vísti seg at vera eitt sama slag, sum eg hevði møtti áðrenn eg snaraði til Funningsfjarðarvegin, eg helt áfram niðan ímóti tunnlinum, tá síggi eg eitt lítið hvítt skelti ella rættari sagt ein hvíttmálað finérpláta, sum var ca. 1/2 m2.

Fyri at finna útav, hvat stóð á plátuni, var eg noyddur at fara heilt út á vegjaðaran fyri at kunna síggja hvat stóð á plátuni og síggi tá, at forboði var bara galdandi gerandisdagar. Tá ið eg komi oman ímóti Funningsfjarðarvegnum, beri eg eyga við eina hvíta finerplátu sum stóð sunnanfyri Funningsfjarðarvegin.

Aftan á hendan túrin meti eg meg vera villleiddan í ein vissan mun.

Stóð tað til mín, skuldu tær hvítu pláturnar verið eitt undirskelti til tær stóru og so kundi tað staðið á onkrum øðrum máli eisini, tað eru útlendingar sum eisini koyra her á landi.

Eigur Landsverk ikki at dekka tey til, tá ikki verður arbeitt?

Hví verða skeltini sett upp á hendan hátt?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.